## John Havn fekk triðja pláss

Føroyameistarin í egning, John Havn, var um vikuskiftið og tók lut í HM kappingini í egning í býnum Kjøllefjord í norður Noregi. Fyrrverandi heimsmeistarin megnaði tó ikki at endurtaka bragdið frá 2005, tí hann endaði á triðja plássi. Heimsmeistari gjørdist norðmaðurin, Kjelle Ovesen, úr Gravdal í Lofoten. Kappingin í Noregi varð tó ikki líka skipað, sum kappingin í Føroyum í 2005 var. Munurin millum kappingina í Føroyum og Noregi var, at í Noreg vóru engdir 50 húkar ímóti 100 húkum í Føroyum, meðan teymarnar í Noregi vóru úr klønum nylon.



# Altjóða ráðstevna um bróstkrabba

**Komandi ár verður árliga norðurlendska ráðstevnan um bróstkrabbamein hildin í Føroyum. Føroyska krabbameinsfelagið hevur tætt samstarv við hini norðurlondini, og føroyingar hava ofta luttikið á norðurlendskum ráðstevnum fyri áhugafeløg innan bróstkrabba**



*Jónvør Christiansen prátar við nakrar av hinum luttakarunum, sum komu bæði úr Europa, Afrika, Asia og Amerika*



*Annar av føroysku luttakarunum aftan fyri Drotning Sylviu, Jónvør Christiansen, sum eisini luttók á ráðstevnuni fyri sjálvhjálparbólkar í bróstkrabba*

KRABBAMEIN

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Fyri stuttum vóru umboð fyri Føroya Krabbameinsfelag fyri fyrstu ferð á altjóða ráðstevnu, har 350 luttakarar úr øllum heiminum vóru samlað at tosa um týdningin av góðum samskifti í samband við krabbamein og krabbameinsviðgerðir.

Ráðstevnan var hildin í Stokholm, og føroysku umboðini vóru Heidi Hvidbro og Jónvør Christiansen, sum eru núverandi og fyrrverandi forkvinnur í sjálvhjálparbólkinum, Bót til Bata.

- Tað var spennandi at koma í samband við fólk frá so nógvum fjarskotnum londum, sigur Jónvør Christiansen.

- Høvðusevnið var, hvussu sjálvboðnar kvinnur globalt hjálpa kvinnum og um hvussu týdningarmikið sjálvboðið arbeiðið og samskifti millum kvinur er.

Ráðstevnan gav eitt gott innlit í hvussu torført tað kann vera at samskifta um bróstkrabba. Í onkrum mentanum er onki orð fyri bróst, og aðarstaðni er ikki loyvi at taka orðið á tunguna. Stór skomm er tí fongd at sjúkuni, og onkustaðni halda tey, at tað smittar, og kvinnan verður koyrd í isolatión.

Sjálvboðin mugu ofta brúka nógva orku at fáa samband við myndugleikapersónar, átrúnaðarligar leiðarir og aðrar fyrimyndir fyri at fáa rætta boðskapin út til fólkið.

- Onkustaðni trúgva tey, at orsøkin til, at ein hevur fingið bróstkrabba er, at forfedrarnir hava gjørt okkurt, ella mamman hevur gjørt okkurt, meðan hon var við barn. Viðkomandi má tí góðtaka at bera skuldina, og fer tí ikki til lækna, sigur Jónvør Christiansen.

- Í onkrari mentan hevur maðurin loyvi at taka eina aðra konu, um bróstið verður tikið. Hon verður ikki hildin at kunna nøkta hansara kynsliga tørv, og hann kann tí fáa sær eina aðra. Kvinnur í slíkum mentanum velja ikki at fara til lækna, tí sjúkan er ein hóttan móti hennara sosiala grundarlagi.

Ráðstevnan var í Svøríki, sum er eitt undangonguland innan bróstkrabbaviðgerð og hevur heimsins penastu tøl fyri yvirlivilsi við langari traditión fyri mammografiscreening.

Men í Svøríki eru tað ikki øll, sum taka av tilboðnum um screening, 70-75 % í stórbýunum, og 85-90% í restini av landinum taka av. Orsøkin til hetta er, at kvinnur halda, at sjúkan ikki rakar tær. Krabbamein rakar bara hini. Veruleikin er at 8. hvør kvinna fær bróstkrabba.

Føroyar er einasta Norðanland, sum ikki hevur mammografiscreening. Landsstýrismaðurin í Heilsumálum hevur lovað at innføra screening komandi ár. Hetta árið fyllir bróstkrabbabólkurin, Bót til Bata, 20 ár.

# Løgtingsformaðurin hevur meirilutan við sær



*Tá hvørki flokkarnir ella samgongan megnar at gera eitt uppskot um Føroyar sum eitt valdømi, so er tað rætti hátturin, at formansskapurin ger tað, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður*

**Løgtingsformaðurin tryggjar sjálvur, at meiriluti er í formansskapinum í løgtinginum fyri, at uppskot um at gera Føroyar til eitt valdømi skal fyrireikast**

POLITIKKUR

*Eyðun Klakkstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Edmund Joensen, løgtingsformaður, sigur, at meiriluti er í formansskapinum í løgtinginum fyri, at eitt uppskot um at gera Føroyar til eitt valdømi verður fyrireikað.

- Vit hava havt eina atkvøðugreiðslu í formansskapinum, og tá ið tað stendur á jøvnum 2-2, er atkvøðan hjá formanninum avgerandi, og tí er meiriluti fyri at fyrireika uppskotið um eitt valdømi. Tá ið uppskotið er liðugt, verður tað aftur lagt fyri formansskapin at taka støðu til, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður.

Á fundi tann 30. mai varð málið um broyting í vallógini fyri í formansskapinum. Edmund Joensen og Óli Breckman vóru fyri at gera eitt uppskot um at Føroyar verða eitt valdømi, meðan Heirgeir Nielsen og Vilhelm Johannesen vóru ímóti. Umsitingin í løgtinginum skal nú fyrireika uppskotið, og so verður tað væntandi lagt fyri løgtingið eftir ólavsøku.

- Hetta er rætti hátturin at fáa uppskotið í løgtingið. Løgtingið, samgongan og flokkarnir eru sundurbýtt í hesum máli, og hvørki flokkarnir ella samgongan klára at gera eitt slíkt uppskot, sigur løgtingsformaðurin.